# Hvør kasti fyrsta steinin?



JÓNA MORTENSEN

Eg ætlaði mær ikki at skriva nakað sum helst um hetta málið. Men eg kann ikki lata vera. Eg haldi tað vera so flovisligt at lesa alt hatta tvætlið frá Jenisi av Rana, um tey samkyntu. Hann skrivar síðu upp og síðu niður, og hvat er tað egentliga hann roynir? At yvirbevísa øll um, at hann hevur rætt?

Um tey samkyndu hava valt at verða samkynd ella ikki, er fulkomiliga líka mikið. Liva vit ikki í einum fríum landi?? Men eingin skal billa mær inn, at nakar velur eina samfelagsborgaraskap sum ein lítil útstoyttur bólkur ella ein lítil jagstraður flokkur, tí tað er jú tað, sum tað er blivið til.

Eg minnist ein drong, ið gekk í mínum flokki í barnaskúlanum. Hann var meira femininur enn nøkur genta í flokkinum. Hann var klænmæltur og hevði eitt feminint gongulag. Seinni fekk eg at vita, at hann var samkyntur, og tað visti eg væl. Vit vóru ’nemmiliga’ góðir vinir. Men valt tað sjálvur, tað hevði hann ikki. Hatta hevur nakað við kromosomir at gera!

Eg fái ilt allastaðni av at lesa lesarabrøvini frá Jenisi av Rana, Peturi Hermansen og øðrum.

Petur Hermansen skrivaði, at tey samkyntu vóru nøkur grenj, og at hann eisini var blivin happaður sum barn. At Petur Hermansen er blivin happaður, er jú ræðiligt. Vit hava eisini kent svian av happing í okkara familiu, men tað ger so sanniliga ikki trupulleikan hjá teim samkyntu minni, og tað legaliserar heldur ikki happing sum heild. Ein skuldi tvørturímóti hildið, at tílík upplivilsi bara skapa størri forstáilsi fyri trupulleikanum, og at tílík fólk taka størri frástøðu frá happing. Eftir hondini er happing ikki rætta orðið, tá ið tað snýr seg um tey samkyndu. Tað er blivið til forfylging og mannajagstran. At finna upp á at skriva, at øll við brillum og nøkrum kilo-um ov nógv kenna til happing og síðani biðja tey samkyntu lata vera við at grenja, tí tey sjálvi hava valt tað, er sooo langt úti. Eg kann lítið ætla, hvussu familian hjá hesum happaða og jagstraða dronginum hava tað við at lesa sovorðið tvætl. Tað má kennast ótrúliga svárt.

Eg haldi, at fólk hava fullkomiliga misskilt kristindómin. Ein kristin hevur frið í sálini, hevur frið við seg sjálvan og við tey rundanum seg og yvirskot til at geva hinum frið, óansæð um tey skilja seg burturúr fjøldini. Tey hava yvirskotið og viljan til at góðtaka menniskju sum tey eru. Tá ein hevur frið í sálini, hevur ein ikki trongd til at fortelja øðrum, hvat tey ikki skulu gera, tá passar mann sítt egna ’lort’ og vónar, at tær ferðirnar ein traðkaði við síðuna av og ikki gjørdi sum ein átti, verða fyrigivnar, tí mann bara er eitt menniskja og ger feilir allatíðina.

Okkara lutur er ikki at døma onnur, tað fer ein annar at gera fyri okkum.

Ein kann hava sína egnu meining viðvíkjandi teim samkyntu og ein kann útfrá bíbliuni boða gleðiboðskapin. Sum tað eisini verður sungið “Sáa og væta tað kunna vit eina”. Men okkara rættur er ikki at døma, tað fer ein annar at gera fyri okkum á tí eina degi, og væl kundi verði at vit blivu bilsin yvir hvussu dømt verður. Tí minnist til:

ALT TAÐ SUM TÚ GJØRDI ÍMÓTI EINUM AV MÍNI SMÁU, GJØRDI TÚ ÍMÓTI MÆR.

Tað kann gott vera, at tit ‘rættvísu kristnu’ ikki persónliga ella ítøkiliga beinleiðis hava jagstrað nakran samkyntan, men av tí at tit áhaldandi skriva og tosa negativt um henda samfelagsbólk og nærum skíra tey at vera av tí ónda, virka tit fyri meiri øsing, trýsti og ágangi móti hesum fólkum. Tey yngru ávirkast av teimum eldru og hvussu tey tosa og uppføra seg.

--

Eg minnist rokið allastaðni, tá ið sjúkan aids kom fram og ikki minst her í Føroyum. Rólant Samuelsen var tá í útvarpinum og skuldi svara upp á alt møguligt, og millum annað, um tað nú var ein straffur frá Guði. Eg minnist so væl, at Rólant setti spurningin ”um aids er ein straffur frá Gudi fyri eina ávísa lívsførslu, hvørja lívsførslu er so sjúkan krabbamein straffur fyri”.

Petur Hermansen nevnir eisini í sínum lesarabrævi, at Rólant Samuelsen fekk frið at liva sítt lív.

”Nei, Petur Hermansen! Tað fekk hann ikki, og tað var eg sjálv vitni til fleiri ferðir. Tað var heldur ikki av ongum at hann og vinurin Benny fluttu til Danmarkar”.

Komi eisini at hugsa um ella minnast aftur á, tá ið aidssjúkan byrjaði og avbyrgdir sjúklingar fingu vitjan av móðir Theresu. Hetta vóru fólk, sum eingin tá fór í nánd av, og vóru tey viðfarin sum spedølsk. Men móðir Theresa fór til teirra, tosaði og nam við tey. Hon kundi jú fingið allan katolikkaheimin ímóti sær. Men hon var trygg og hvíldi í sær sjálvari, og hjálpti har hon kundi hjálpa.

Hetta má kallast næstakærleiki og sannur kristindómur.

So mítt ynski og vón er, at fólk hugsa seg um og altíð vera við tí góða og uppbyggjandi orðinum.

GHM:

## Konsert við nýggjum føroyskum tónleiki

KONSERT

Sunnudagin 29.oktober kl. 16:00 verður forkunnug konsert í Norðurlandahúsinum.

Tað er Harmoniorkestrið GHM sum fer at framføra seks nýskrivað verk, sum eru innkomin til kapping, útskrivað seinasta heyst. Orkestrið gjørdi av at útskriva kapping fyri at fáa til vega føroysk verk til orkestrið. Hettar er heldur sjáldsamt stig at taka, men mett varð, at hesin møguleikin at fáa til vega føroyskan tónleik er neyðugur liður í menningini av orkestrinum.

Harmoniorekestrið GHM hevur seinasta árið verið sera virkið og havt nógvar spennandi konsertir við ymiskum temaum.

Orketrið varð stovnað í 1922 og hevði tá nakrar fáar spælarar. Orkestrið hevur síðani ment seg, og er í dag mannað við 65 spælarum í øllum aldri, tó flest í yngra endanum.

Tórshavnar kvøld- og Ungdómsskúli stuðlar orkestrinum við t. d. venjara, og hettar ger, at til ber at fáa proffessionellan venjara til orkestrið. Tað førir síðani við sær, at orkestrið kann mennast og vera ført fyri at spæla ymiskt slag av tónleiki sum krevur ymiskan førleika.

Musikkskúlin ger, at spælarar í dag eru nógv betur fyri, tá teir koma í orkestrið, og tí er møguligt at hava eina konsert sum hesa við nýggjum føroyskum tónleiki. Tónamálið til eina orkestur-konsert av hesum slagnum er eitt sindur øðrvísi, enn vit vanliga hoyra, forkunnugt hjá spælarum og áhoyrarum.

Bernharður Wilkinson, sum er royndur dirigentur og sum eisini hevur fingist nógv við nýskrivaðan tónleik, hevur vant orkestrið, og hettar hevur eisini verið við til at ment orkestrið nógv.

Dómararnir eru úr Danmark, Jesper Rosenkilde, tónleikari og dirigentur og úr Íslandi Tryggvi Baldvinsson, tónleikari, tónaskald og dirigentur.

Tríggir vinningar verða latnir, og teir eru stuðlaðir av Norðurlandahúsinum, Fjølrit, Mentanargrunninum og Tórshavnar Býráð.

Seks verk eru innkomin, og vinnarin verður funnin á konsertini sunnudagin 29. oktober kl. 16:00 í Norðurlandahúsinum.

# At siga sum er



THORBJØRN BROCHS

Í Sosialinum 19. oktober var eitt aftursvar til Jenis av Rana. Viðkomandi segði í grein síni, at tað var ein loddrøtt lygn, tá ið sagt varð, at homoseksualitetur var nevndur sum grund fyri oyðing Sodomu, sum er at finna í 1. Mós.

Sjálvur eri eg varin við at nýta Bíbliuna, tá ið eg skal argumentera fyri verðslig viðurskifti. Men lygnin um Bíbliunnar innihald er so grov, at eg haldi tað vera neyðugt at rætta lygnina og at vísa á, hvar í Bíbliuni tú finnur tilburðin nevndan. Bíblian sigur ikki alt í einum ørindi, men hon nevnir tríggjar høvuðsgrundar fyri oyðingina: Harðskapur, homoseksualitet + siðloysi yvirhøvur, og “hástór egoisma”. Vilt tú síggja veruleikan, so lesið 1. Mós. 19, 4-10. Í minsta lagi, ella kap. 18 og 19.

Framyvir vil eg ikki taka lut í nakrari politiskari “bibliugransking”. Eg eri samdur við Luther um, at kirkjan og tað verðsliga valdið ikki skulu sova í somu song. Men okkara sannføring mugu vit øll standa við í dagligdegnum. Til tess eru vit sett.

Annars haldi eg ikki, at vit í hesum føri skulu kjakast í bløðunum, um hvørt tað er rætt ella skeivt at vera samkyndur. Tað má ein og hvør sjálvur taka ábyrgd av, og hann má sjálvur velja, hvørja grund hann byggir sína avgerð á.

Málið sum nú er frammi eigur í staðin at snúgva seg um at verja fólk móti ringari viðferð, uttan at fremja annan órætt fyri at koma á mál.

# Fólkaheilsuætlan



RÓSA SAMUELSEN

Sera stórt og dygdargott arbeiði verður gjørt við Fólkaheilsuætlan fyri føroyinga. Tað er sera áhugaverkt at fylgja við hvørjar ætlannir eru gjørdar fyri at vit Føroyingar skulu hava tað so gott sum gjørligt.

Tað er av stórum týdningi at vit varpa ljós á heilsufremjandi tiltøk, so sum sunna lívsførslu, tað kann verða sunnan mat og at ein rørir seg.

Men tað er eisini sera umráðandi at vit hugsa um at seta heilsufremjandi tiltøk í verk longu í viðgongutíðini (graviditetinum), fyri at tryggja okkum at mamman/foreldrini eru tilvita um hvat tað er at vera foreldur og familia, og kunna gleðast yvir at møta tí lítla barninum.

Vit mugu tryggja okkum at børnini vaksa upp undir sømiligum viðurskiftum, at familian og serliga barni fær tilboð um heilsufremjandi átøk. Nøkur tilboð eru longu, men eg haldi at familian sum heild skal hava møguleika at fáa heilsufremjandi vitjan frá heilsufrøðingi longu í viðgongutíðini, fyri at tryggja familiuni best møgulig sálarlig og sosial viðurskiftir.

Vit mugu tryggja okkum at jarðamøður, læknar og heilsufrøðingar, fylgja tilráðingunum frá Danska heilsustýrinum og Who.

Ein tilráðing út av fleiri, fyri at nevna nakað sum ikki er umrøtt, er at øll børn, har mamman hevur møguleika at geva barninum bróstamjólk, skal fáa vegleiðing og stuðul til at hetta skal eydnast.

Heilsustýri tilmælir at barni fær bróstamjólk minst í eitt hálvt ár sum einasta føðslukelda, og Who tilmælir at barni bert fær bróstamjólk í hálvt ár, síðan vanligan mat tilsvarandi barni og bróstamjólk í tvey ár. Hetta tí at bróstamjólk er heilsugóð føði fyri barni, og verjir barni fyri fleiri sjúkum, bæði í pinkubarnatíðini og seinni í lívinum. Øll nýfødd børn skulu verða kannað av barnalækna áðrenn tey fara heim av sjúkrahúsinum og heilsufrøðingur kemur á heimavitjan so skjótt mamma og barn eru komin heim.

Barnsburðafarloyvi skal gerast meira rúmshátt, og møguleiki skal vera at leingja tað upp til eitt ár. Hettar ger so eisini at barni hevur møguleika at vera heima tað fyrsta árið og er meira mótstøðuført fyri sjúkum tá tað so kemur í vøggustovu millum onnur børn.

Arbeiðsmarknaðurin skal eisini gerast meira rúmsháttur. Mamman, ið má aftur til arbeiðist, skal hava møguleika at fara at geva bróst í arbeiðstíðini. Meira rúmd skal verða givin pápanum í hesum tíðarskeiði og helst allan barndómin hjá barninum.

Øll smá børn skulu fáa tryggja heilsugóðan mat og góðar karmar at spæla undir har tey verða ansaði.

Tað skal verða ein rættur hjá øllum børnum og ungum í skúla, líka so væl sum hjá vaksnum í arbeiði at hava góðar umstøður við kantinu soleiðis, at møguleiki er at keypa frugt og heilsugóðan kost í skúlatíðini, baði í fríkorteri sum í matarsteðgi.

Øll børn og ung í Føroyum skulu hava ein vaksnan at fara til. Til dømis skal heilsufrøðingur og sálarfrøðing við servitan, verður knýttur øllum fólkaskúlum og miðnámsskúlum, sum í Svøríki. Setast skal inn við týdninginum við rørslu og tímar avsettir til tess. Uppá sigt vil hetta fyribyrgja vælferðasjúkum og vit fáa eina sunna og góða tilverðu.

Til at seta hesi tilboð í verk, krevst at nakrar millónir krónur verða settar av á fíggjarlógini. Hettar er alneyðugt um vit hugsa heilsufremjan, sum visjón, og betrar hettar um lívskvalitetin hjá fólki og likvitetin í landinum.